Á brúnni á Norrønu síðani 83:

# Vegamót: Sorgblýdni og gleði

**Henrik Hammer, skipari vónar, at ikki bert summarsiglingin fer at mennast, men at føroyingar eisini fara at ferðast meira um veturin**

FERÐAVINNA OG FLUTNINGUR
*Jan Müller*



*Henrik Hammer, skipari og Jónas Hallgrímsson, nevndarlimur í Smyril Line gera klárt til at fara seinasta túrin í summarsiglingini hjá »gomlu« Norrønu nakrantíð.*

*Mynd Jan*

Fríggjadagin í farnu viku fór Norrøna sín seinasta túr í summarsigling. Tað var sjálvandi við blandaðum kenslum, at eitt nú skiparin Henrik Hammer fór á brúnna henda seinasta túrin í summarsigling. Ein blandingur millum sorgblídni og gleði. Har gamalt skjótt skal skiftast út við nýggjum. Sjálvur hevur Henrik Hammer verið á brúnni á Norrønu síðani 83. Hann heldur sjálvandi, at tað verður spennandi at koma umborð á nýtt skip, sum m.a. betri kann nøkta tørvin hjá ferðafólki, men hann dylur ikki yvir, at tað er eitt sindur "vemodigt" at skula siga farvæl til verandi Norrønu, nú hon so trúliga hevur røkt hesa sigling, uttan stórvegis trupuleikar.

Henrik verður aftur á brúnni, tá nýggja Norrøna leggur frá landi í Lübeck næsta ár við kós móti Atlantshavinum. Hann gleðir seg og telist ikki millum teirra, sum ikki trúgva uppá hetta projektið. Hann viðgongur, at skipið er dýrt men heldur at tað fer at bera til, tí henda rutan er komin fyri at verða og til at menna.

Nú Smyril Line er farið at menna vetrarsiglingina eisini og tølini fyri hesa sigling eisini kvinka uppeftir, so vónar skiparin á Norrønu, at tað fer at ganga uppaftur betri við nýggja skipinum, tí man tá hevur nakað heilt annað at bjóða ferðafólki. – Tað hevði verið hugaligt, um føroyingar fóru at ferðast um veturin eisini við skipi – við møguleika at hava bilin við.

Jónas Hallgrímsson, nevndarlimur í Smyril Line:

# Nýggja Norrøna stóran týdning fyri Ísland - Føroyar og Hetland

FERÐAVINNA OG FLUTNINGUR
*Jan Müller*

Millum ferðafólkini við »gomlu« Norrønu seinasta túrin í summarsiglingini nakrantíð var eisini ein av undangongumonnunum fyri hesi sigling, Jónas Hallgrímsson úr Seyðisfirði í Íslandi. Hann var nógv ár nevndarformaður og er nú nevndarlimur og framvegis ein av primus motorunum í hesi verkætlan. Jónas hevur verið við heilt frá byrjan ella rættari frá áðrenn tað veruliga byrjaði við Norrønu. Hann var við frá 1975, tá Smyril fór undir uttanlandssiglingina. Tá var hann borgarstjóri í Seyðisfirði.

– Hetta hevur verið ein fantastisk tíð og gongd. Nógv góð fólk hava lagt lív og sál í hetta projektið hesi seinastu 27 árini. Og Smyril Line og Norrøna eru komin fyri at verða. Vit trúgva tí avgjørt uppá hesa verkætlan. Og nú onkur setir spurnartekin við, um tað fer at bera seg, kann eg bert siga, at tað varð eisini sagt, tá Smyril varð keyptur og ta keypið varð í veruleikanum nógv størri uppá seg enn hetta er tað. Jónas Hallgrímssson vísir eisini á, at teir nú hava munandi betri fígging enn talan varð um tá.

Jónas Hallgrímsson sigur, at Norrøna hevur ómetaliga stóran týdning fyri Ísland og tá ikki minst fyri økini uttan fyri Reykjavík og stórbýirnar. Tí ferðafólkini, sum koma við Norrønu, leita út um alt Ísland og hava harvið stóran týdning fyri menningina og trivnaðin í útjaðaranum. Soleiðis hevur Norrøna ein stóran búskaparligan og samfelagsligan týdning fyri Ísland. Tað var eisini tí, at íslendingar settu fimm mill. kr. í nýggju Norrønu.

Jónas vísir á, at teir í Seyðisfirði gera stórar íløgur í betri havn og móttøku fyri góðar 50 mill. kr. Hann heldur tað vera rætt at sigla til Seyðisfjarðar og ikki Reykjavík. – Hetta er stytsta leiðin millum londini, og ferðafólkini, sum koma til Íslands, vilja heldur síggja náttúruna og landið enn at sita á barr í Reykjavík.

Onkuntíð hevur verið roynt at taka kappingina upp við Norrønu. Vit spurdu Jónas, um hann sær nakran vanda í tí. – Tað trúgvi eg ikki, men um tað verður, so mugu vit bara taka kappingina upp.

Jónas Hallgrímsson sigur seg vóna, at samstarvið fer at vera eins gott í framtíðini sum tað hevur verið øll hesi árini, nevniliga fyrimyndarligt og ynskir hann eisini hetlendingum vælkomnum at vera við í hesi verkætlan.

– *Men hevði ikki verið betri at siglt til Skotlands?*

– Nei. Vit eru oyggjabúgvar. Og oyggjabúgvar halda saman. Teir skilja hvønn annan.

# Løgdu botn til nýtt vertshús





Í góðveðrinum seinasta fríggjadag varð bókstaviliga botnur lagdur til enn eitt vertshús/matarstað í høvuðsstaðnum, tá ein av eigarunum av Restorffs Bryggjarii, Johan Mortensen, hevði móttøku í hølunum í sambandi við sín fimti ára føðingardag. Óvanliga góða veðrið og so tað forkunnuga í at hølini í næstum verða latin upp fyri almenninginum sum vertshús og matarstað vóru ein orsøk til, at eini 300 fólk høvdu leitað sær í húsini hjá Dia á Vertshúsinum, sum tey altíð hava verið rópt. Har vóru fiskafólk, oljufólk og vinir og kenningar hjá føðingardagsbarninum og gomlu havnarfyritøkuni. Sum eitt frískligt innslag í góðveðrinum spældi húsorkestrið hjá Restorffs, Orangutang Brothers.

Sosialurin skilur, at ætlanin er at lata upp nýggja vertshúsið og matarstøðið tíðliga næsta ár, men at har longu í vetur verða tiltøk. Eitt nú er ætlanin at leiga út miðhæddina til veitslur og samkomur so sum firmadøgurðar og jólaborðhald. Ætlanin er at innrætta pubb í kjallaranum og skonkistovu í miðhæddini og eisini at hava umstøður til at fáa okkurt til matna.

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 20. september til hósdagin 26. september**

## Borð um borð 4:7




*Fjórða og seinasta innleiðandi sendingin í spurnarkappingini "Borð um borð" kemur sunnukvøldið. Hesa ferð bjóða Janus Norðberg og Sjúrður Guðjónsson brøðrunum Tummas Paula og Jákup Thomsen av. Verturin er tann sami, hann eitur Leivur Hansen og til at halda skil á stigunum er Marius Rein.*

## Frásøgn frá fótbólti




*Hetta er triðseinasta umfarið í landskappingini. Oddaliðið HB hevur heimadyst móti Skála, sum liggur í niðara enda. Nummar tvey KÍ hevur torføran dyst á heimavølli móti GÍ, og nummar trý NSÍ fer suður á Tvøroyri at spæla móti TB.*

## Serlingar




## ! - vinir




## Pyjamasbananirnar




## Robinson Ekspeditionen

*- det endelige opgør*

